# Guðrun og Jacob í Føroyum

TÍÐINDASKRIV

Guðrun Sólja Jacobsen er kendasta føroysku songkvinnan í Danmark. Eftir at hon vann sangkappingina »Stjørna í eitt kvøld«, sum Danmarks Radio skipaði fyri, varð hon landskend bæði í Føroyum og í Danmark.

Nú hevur Guðrun givið fløgu út í Danmark, og henda fløga seldi beinanvegin heilt væl. Sangirnir av fløguni eru nógv at hoyra á útvarpsrásum í Danmark, og ein av sangunum stendur seg væl á kenda hitlistanum, Tjeklisten, sum P3 hjá Danmarks Radio ger.

Í november mánaði kemur Guðrun til Føroya at hava konsertir í sambandi við nýggju útgávuna hjá sær. Í fylginum, sum kemur hendan vegin, eru eini 12 fólk. Ein bólkur við dugnaligum donskum yrkistónleikarum fer at spæla undir. Jacob Andersen, sum rættuliga gjørdi um seg í vár á palli í Føroyum, verður eisini við á konsertunum. Jacob hevur júst givið eina fløgu út, so tað verður spennandi at hoyra tey bæði á palli saman aftur.

Fríggjadagin. 21. nov. kl. 21.30 verður sitikonsert í Ítróttarhøllini í Trongisvági. Leygardagin 22. nov. kl. 19.30 verður sitikonsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og kl. 23.30 verður konsert og dansur í Mentanarhúsinum. Bussamband er til hetta tiltakið. Sunnudagin verður farið til Klaksvíkar har sitikonsert verður kl. 20.00 í KÍ-Høllini.

Atgongumerkir til tiltøkini eru at fáa í forsølu frá mánadegnum 3. nov.





TIMBURHANDILIN Í RUNAVÍK

NOVEMBER ÚTSØLA

KOM OG GER KVETTI!

VI HAVA YVIR 1000 M² AV PARKETT GÓLVI Á GOYMSLU, SUM VIT SELJA FYRI EIN SERA GÓÐAN PRÍS!

DØMI:
MERBAU OLJERA
KR. 310,-M²
-
PLANK GÓLV EIK ELLA ASK
KR. 305,- M²
-
HEVEA HVÍTT OLJERA
KR. 199,- M²



Eik plank lakera

Tlf. 447272 - Fax 447298
E-mail: timbdeild@hojgaards.fo

WWW.HOJGAARDS.FO

P/F Højgaards Handilsvirki






*Sigurd Johannesen og onnur við honum ilskast um vánaligu hoyrilíkindini við Sundalagið. Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, sigur, at Útvarp Føroya kann ikki gera nakað við trupulleikan, tí tað er Føroya Tele, ið umsitir sendinetið*

# Ikki okkara borð

**Útvarpsstjórin, Jógvan Jespersen, sigur seg ikki kunna gera nakað fyri at betra hoyrilíkindini í Sundalagnum. Føroya Tele umsitir sendinetið, og trupulleikin liggur tískil á teirra borði, sigur hann**

HOYRILÍKINDI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í Sosialinum leygardagin høvdu vit eina grein um vánaligu hoyrilíkindi við Sundalagið. Sigurd Johannesen ilskaðist um, at Útvarp Føroya hoyrist so illa, og tað var bert spurningur um tíð, áðrenn hann noktaði at gjalda útvarpsgjald.

– Tú hoyrir útvarpið, men um ein bilur verður parkeraður beint við húsini, so noyðist tú út at flyta bilin, segði Sigurd Johannesen millum annað í leygardagssosialinum

### Ikki okkara trupulleika

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, harmast um støðuna. Hann ger vart við, at í Útvarpi Føroya eru tey fullgreið yvir trupulleikan.

– Vit vita, at tað er ein trupulleiki við hoyrilíkindunum í Sundalagnum, men vit fáa einki gjørt, tí tað er Føroya Tele, sum umsitir sendinetið, sigur Jógvan Jespersen

Hann vísir okkum til Føroya Tele, sum vegna Vinnumálaráðið, umsitir sendinetið. Spurdur um hoyrilíkindi eru líka vánalig aðrastaðni í landinum, svarar Jógvan Jespersen, at sjálvt í Havn eru hoyrilíkindi ikki nøktandi.

Hann vísir á, at íløtuni er ein arbeiðsbólkur, við fólki millum annað frá Vinnumálaráðnum, SVF, ÚF og Fjarskiftiseftirlitinum, settur at arbeiða við trupulleikanum

Jógvan Jespersen sigur seg at enda, at hann vónar at hoyrilíkindini fara at batna í framtíðini.

# Nýggj fløga við bólkinum Run

FLØGUÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Plátufelagið Tutl gevur í hesum døgum fløgu út við nýggja bólkinum Run. Fløgan varð innspæld í Studio Bunkern í Stockholmi í juni mánaða í ár, og inniheldur 10 løg. Løgini verða øll sungin av Unn Paturson. Tónleikararnir eru Anders Jormin (kontrabass), Hilmar Jensson (gittar) og Rógvi á Rógvu (trummur og slagverk).

Tónleikurin á fløguni er fólksligur og jassutur. 8 nýggj løg eru á fløguni, og tey hevur Unn Paturson gjørt, tað eina saman við Rógva á Rógvu. 2 coverløg eru á fløguni. Tey eru »Fragile« hjá Sting og »Róund Midnight« hjá Thelonious Monk.

Tekstirnir eru á enskum og føroyskum, og eru skrivaðir av Unn Paturson. Lív Mariu Róardóttir, Annfinni Zachariasseni og Róa Patursson. Eisini er lag sett til yrkingina »Lívi« hjá H.A. Djurhuus.

Run verða næstum at hoyra á vertshúsinum í Havn og á Café Natúr. Tá verður bólkurin mannaður av Unn Paturson, Rógva á Rógvu, Arnold Ludvig og Heðin Ziska Davidsen.



*Manningin í Run: F.v Unn Patursson, Rógvi á Rógvu, Anders Jormin og Hilmar Jensson*

## Rætting

Í grein um P/F Wenzel í blaðnum leygardagin er ein villa komin í. Nevnt verður, at Reyni Service hevði størsta yvirskotið í fjør upp á góðar 28 mio. krónur. Rætta talið skal verða 5,8 mio krónur í yvirskoti, og 28 mio. í eginpeningi. Vit biðja orsaka mistakið.

**blðm**

# Sendinetið treingir til ábøtur

**Tekniski stjórin á Føroya Tele ásannar, at sendinetið treingir til ábøtur. Føroya Tele og Útvarp Føroya arbeiða í løtuni saman við at staðfesta á hvørjum økjum neyðugt er við ábøtum**

HOYRILÍKINDI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Páll Vesturbúð, tekniski stjórin hjá Føroya Tele, sigur seg vera fullgreiðan yvir, at í støðum kring landið eru hoyrilíkindi ikki nøktandi. Hann greiðir frá, at Útvarp Føroya og Føroya Tele arbeiða í løtuni saman við at staðfesta á hvørjum økjum neyðugt við ábøtum á sendinetinum. Hann leggur eisini afturat, at í nógvum førum er loysnin til vánaligu hoyrilíkindunum at finna í eini betri antennu hjá einstøku húsarhaldunum kring landið

Spurdur, um Føroya Tele fær nógvar klagur um vánalig hoyrilíkindi, svarar Páll Vesturbúð, at hann er ikki fullgreiðir yvir, um stovnurin fær nógvar klagur, men hann hevur varhugað av, at kring landið eru hoyrilíkindi ikki av teimum bestu hjá øllum. – Tá vit eru lidnir at kortleggja, hvar í landinum neyðugt er við ábøtum, verður lættari at fremja neyðugu broytingarnar, sigur Páll Vesturbúð


SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

Telduskeið til nýbyrjaran í Tórshavn og í Eysturoynni

**Lær at nýta teldu - á KVASIR**
3 x kl. 09:00-12:00: 08/11 + 15/11 + 22/11
**Lær at nýta tekstviðgerð - á KVASIR**
3 x kl. 13:30-16:30: 10/11 + 17/11 + 24/11
**Lær at nýta teldu - í Runavíkar Skúla**
3 x kl. 19:00-22:00: 12/11 + 19/11 + 26/11
**Lær at nýta rokniark - í Runavíkar Skúla**
3 x kl. 19:00-22:00: 13/11 + 20/11 + 27/11

Tel 320 204
www.kvasir.fo